# Heystið í Sydney nærkast

*Esther G. Hansen og Heidi Andreasen stóðu seg sera væl í svimjikaping í Sheffield um vikuskiftið*



*ÍSF forsetin, Heðin Mortensen, ynskir Heidi Andreasen tillukku við avrikinum í Sheffield*

**Mynd: Jens K. Vang**

Jákup Mørk

Seinastu vikuna hava tær báðar føroysku svimjigenturnar, Esther G. Hansen og Heidi Andreasen luttikið í opnari kapping í Sheffield. Talan er upprunaliga um kapping um enska meistaraheitið, men samstundis er kappingin opin.

### Setti met

Ikki kann sigast annað enn, at tað gekst teimum báðum føroysku gentunum væl á ferðini. Frægasta úrslitið stóð Heidi fyri, tá hon kappaði ikki færri enn átta sekund av europeiska metinum á teininum, 400 m bringa.

Venjarin hjá føroysku gentunum, Katrin D. Johansen, greiður frá, at orsøkin, til at Heidi somikið knappliga tók so nógv burtur av metinum, er, at hon undan kappingini flutti bólk.

Svimjararnir eru bólkaðir eftir, hvørji brek tey hava, og undan kappingini var Heidi sett í bólk 9. Katrin heldur tó sjálv, at rættari var, um Heidi luttók í bólki, og hetta ynski er nú eisini eftirlíka.

Esther, sum eisini luttekur í bólki 8, setti ikki met á ferðini, men fekk kortini fleiri góðar plaseringar, uttan at hetta tó rakk til heiðursmerki.

### Fyrireiking til OL

Luttøkan í Sheffield er liður í fyrireikingunum hjá teimum báðum gentunum til OL í Sydney, sum verður í heyst.

Føroyar eru í hesum sambandi sjálvstøðugur limir, og hava fingið tilluta eina kvotu upp á tvey ítróttafólk. Kraavtíðirnar hjá Esther og Heidi vórðu uppfyltar á heysti í fjør, og síðani hevur verið vant miðvíst móti málinum.

Katrin greiður frá, at tað nú er um at koma verulig ferð á venjingarnar, og genturnar leggja nógv fyri.

Ætlandi skal venjast einar tvær ferðir um dagin komandi tíðina, Í august mánaði verður so saman við øðrum norðurlendskum svimjarum farið á venjingarlegu í Esbjerg, og tá september mánaði er farin at halla, verður farið til Brisbane, har seinasta hond verður løgd á fyrireikingarnar, áðrenn farið verður til Sydney, har Paraolympisku leikirnir verða hildnir um miðjan oktober.

Eisini ferðin til Brisbane er liður í norðurlendskum samstarvið millum svimjisambondini.

### Long ætlan

Sum kunnugt, so var tað í 1988, at Katrin sjálv var ein av teimum svimjarum, sum vann hópin av gullmerkjum í Paraolympisku leikunum í Seoul. Nærliggjandi er tí at spyrja, um tað verður gullregn aftur í heyst.

- Eg haldi ikki, at vit skulu seta vónirnar alt ov høgt, sigur Katrin. Sjálvandi hava genturnar ein møguleika, og metið hjá Heidi boðar jú eisini frá góðum.

Vit skulu minnast til, at genturnar bert eru ávíkavist 14 og 15 ára gamlar, og at vit tí skulu vera varin við at seta alt ov høg krøv til tær. Eisini tí kappingin í eini somikið stórari kapping, sum OL er, er knallhørð.

Katrin greiður annars frá, at stóra málið hjá gentunum sum so ikki er OL í ár, men hinvegin um fýra ár.

- Eg havi sagt við tær, at um tær megna at svimja seg í finalubólkin í teimum greinum, har tær standa seg best, so er hetta eitt avbera gott úrslit, sigur Katrin at enda.

Hvussu er og ikki, so tykist í øllum førum greitt, at vit eiga nógv gott í væntu frá nýggju gullfiskum okkara. Framtíðina hava tær í øllum førum fyri sær, og so er spurningurin, vussu langt tær megna at vinna seg fram í árunum sum koma.

# Bæði krevja sigur

*Bæði HB og FS Vágar mugu vera leikarar fyri uttan, men breiddin hjá havnarliðnum tykist vera nógv størri*

Jákup Mørk

Tað er við vónum um trý stig, at HB leikararnir í kvøld fara vestur í Vágaoynna at spæla útsetta dystin frá fjórða umfari.

### Heldur krav

Vón er kanska eitt heldur veikt orð, tí skala HB framhaldandi hanga fast í toppinum, er kravið ein sigur á vágamonnum.

Vinnur HB dystin, eru bert fýra stig upp til grannarnar úr B36, og tá talan júst verður um grannauppgerð komandi vikuskifti, kann HB minka munin niður í eitt stig, um talan verður um tveir sigrar hetta fram til sunnudagin.

Florin, sum fekk skaða í lærkrikan í fjórðingsfinaluni móti B36, er framvegis ikki komin fyri seg, og sum skilst ganga væntandi einar tvær vikur afturat, áðrenn hann verður førur fyri at fara á vøllin.

Skaða í lærkrikannum hava eisini teir báðir, Rói Árting og Jón Rói Jacobsen. Rói noyddist at gevast undir upphitingini til B68 dystin, meðan Jøon Rói varð skiftur út í seinna hálvleiki í sama dysti.

Lítil breidd

Skaðar er eisini eitt fyribrigdi, sum vágamenn hava merkt sviðan av seinastu tíðina, og í mun til havnarmenninar, so hava tey har vesturi ikki eins nógv fólk at taka av.

Ringast stendur til hjá Ara Thomassen, sum hevur brotið hondina. Dómurin ljóðar upp á fýra vikur í gipsi.

Harumframt eru Tór-Ingar Akslelsen, Birgir Joensen og Jack Johansen allir ivasamir. Eingin teirra var við seinast, men møguliga kunnu teir pjøssast saman til týdningarmikla dystin.

Hevur HB tørv øa stigum, so hava vágamenn tað ikki minni. Felagsliðið er í løtuni á aftasta sessinum í deildini, og við verandi gongd er líkt til, at teir skjótt verða heilt afturúrsigldir í botninum.

Dystirnir, sum standa fyri framman, eru ikki av tí lættara slagnum, og tí má tað sigast at vera av avgerandi týdningi, at stig fáast burtur úr dystinum í kvøld.

# FÆRØ-REGATTA 2000

*Komandi vikuskiftið skipar Neystið fyri afturvendandi tiltakinum, Førø regatta, har útisetar hava møguleika at halda stevnu*

Róðrarfelagið Neystið í Ishøj, Keypmannahavn, vil við hesum siga frá, at **Færø-regatta**'in í ár verður á hvítusunnu, leygardagin 10. juni 2000 í Strandparken, Ishøj Havn.

Regattain er staðið, har føroyingar hittast, og har tú møtir gomlum vinum, ið tú kanska ikki hevur sæð leingi, og har nýggj vinabond knýtast. Dámurin er sum á stevnunum í Føroyum, har fólk í øllum aldrum luttaka.

Sum nakað serligt í ár fara uml. 500 fimleikafólk frá DGI (Dansk Gymnastik- og Idrætsforbund) at sýna fimleikakynstur síni á stevnuni, og DGI fyriskipar eisini tiltøk, sum stevnufólkið kann luttaka í. Eitt nú verður talan um. squaredans við instruktøri, sandfótbólt, sandminton og sand-volleyball. Tey fara eisini at vísa fram fólkadans. Til tey smáu eru 'hoppupútur' o.a.

Umframt at ymsu føroysku róðrafeløgini luttaka, feløg úr øllum hinum norðanlondunum eisini boðað frá luttøku í norðanlandakappróðri.

Tað verða seldir lutaseðlar við nógvum góðum vinningum, t.d. ferðir til Føroya við bæði flogfarið og skipi.

### Skráin fyri dagin:

Kl. 12.45: Skrúðgonga við luttøku av øllum rógvarum.

Kl. 13.00: Jóhannes (Hannes) Joensen, formaður Róðrarsamband Føroya, heldur røðu.

Kl. 14.00: Kappróðurin byrjar við luttøku av rógvarum frá øllum Norðurlondunum. Fimleikarir frá DGI framvísa fimleik.

Tog-togan.

Kl. 20.00: Handan av heiðursmerkjum. Vinningar frá lutaseðlasøluni verða drignir.

Kl. 21.30: Western Blus spælir til dans.

Kl. 24.00: Felagssangur.

Western Blus spælir víðari til dans.

Kl. 09.00: Morgunmatur í Neystinum.

Undir allari regattaini verður seldur føroyskur og danskur matur og drykkivørur.

Við vón um góða undirtøku

Neystið

# Beachvolley í Sandágerði

*Um góða viku skipar flogbóltsfelagið Fleyr fyri flogbóltskapping í Sandágerði*

Leygardagin 17. juni skipar Fleyr fyri kapping í beachvolley -strandarflogbólti- í Sandagerði. Fyri tveimum árum síðan var líknandi kapping í høvuðsstaðnum, og hon eydnaðist sera væl. Nú verður tiltakið aftur á skránni. Einir 40 flogbóltsleikarar, kvinnur og menn, fara at dystast í Sandagerði.

Kappingin verður skipað sum bólkaspæl við 5 liðum í hvørjum bólki. Eftir bólkaspælið vera hálvfinalur og finala.

Okkurt verður til matna undir kappingini so sum ísur, sodavatn, kaffe og hotdogs. Kl. 15 fara limir í kajakfelagnum at vísa kynstur úti á vánni. Eisini sleppa børnini at royna kajakkirnar í ósanum.

Tilmelding fer fram hjá



Líggjas Høgnesen tlf. 318824. Tá 15 lið hava melda luttøku er fulteknað. Bert tveir spælarar eru á hvørjum liði. Annars verða altjóða reglur nýttar í kappingini. Vinnararnir fáa steyp til ognar.

Fleyr takkar MBM, Føroya Tele, Skilling, Óla Hansen grannskoðara og Hermund Jacobsen grannskoðara fyri stuðulin. Somuleiðis takka vit FBF og Tórshavnar Býráð fyri vælvild í samband við kappingina.



# Gunnar vann

*Eingin ivi var um úrslitið á Norðoyarstevnusúkklingini*





*Bert tveir luttkarar vóru í kappingini fyri juniorar*

Jákup Mørk

Fyrsta umfar í Grand Prix kappingin í súkkling var á Norðoyastevnu, og hjá monnunum var eingin ivi um endaliga úrslitið.

### 1. umfar á muni

Gunnar Dahl Olsen úr Havn snøgt sagt smurdi motstøðumenninar av, og tá hann kom á mál var hann ikki minni enn eitt heilt umfar framman fyri næsta súkklaran.

Spenningurin var tó um plássini frá tvey til fimm, og her eydnaðist tað Kára Brattaberg at halda seg framman fyri Sverra Mohr Edvinsson, Esmar Joensen og Eyðun Poulsen.

Við tað at talan er um fyrsta umfar, hava vit bert valt at prenta úrslitið av norðoyastevnu súkklingini, tí raðfylgjan í hesi og samlaðu støðuni er sjálvsagt hin sama.

Úrsltini í einstøku bólkunum vórðu:

**Vaksin, menn:**
1. Gunnar Dahl Olsen
2. Kári Brattaberg
3. Sverri Mohr Edvinsson
4. Esmar Joensen
5. Eyðun Poulsen
6. Evald Rasmussen
7. Christian Guttesen
8. Jón Ellingsgaard
9. Geyr Gilsteinsson

**Vaksin, kvinnur:**
1. Ann Zachariassen

**Juniorar, menn:**
1. Ísak Sambleben
2. Eli Christiansen

**Dreingir, 10-14 ár:**
1. Dánial Michaelsen
2. Helgi Poulsen
3. Óli Jacobsen
4. Jógvan V. Olesen
5. Høgni Guttesen
6. Sámal Poulsen
7. Andrias Norðbúð

**Gentur, 10-14 ár:**
1. Birgitta Simonsen
2. Hansa Nybo
3. Birna Arge
4. Tórhild Biskupsstøð

**Dreingir, 4-9 ár:**
1. Rani Jacobsen
2. Knud Glerup
3. Filip Sivertsen
4. David Fossdalsá
5. Kristian M. Joensen
6. Pól J. Færø

**Gentur, 4-9 ár:**
1. Bergfríð Joensen
2. Sára Olsen
3. Kristina á Høvdanum
4. Sanna Zachariassen
5. Anna Sólrun



*Fyri fyrstu ferð varð eisini kapping fyri børn. Her síggjast tríggjar tær fremstu genturnar. F.v. Sára, Bergfríð og Kristina*

# Langt millum dystirnar

*Knaooliga átta ár vóru millum teir báðar seinastu dystirnar hjá Karl Leonssyni í fyrstu deild*



*Átta ár eru siðani Karl Leonsson seinast var at síggja á besta B36-liðnum*

**Mynd: Jonhard Hammer**

Jákup Mørk

Tað kemur javnan fyri, at nýggj andlit eru at síggja í fyrstudeildarfótbólti, og nógv hildu eisini at so var, tá NSÍ og B36 hittust sunnudagin.

### Við í 91 og 92

Á B36 liðnum var nevnliga ein leikari, sum mong hildu vera nýggjan, men so var kortini ikki.

Karl Leonsson, sum talan er um, var fyri fyrstu ferð í langa tíð at síggja aftur í fremsta B36 liðnum. Fyrsti dystur hansara var í 1991, tá hann blaðungur varð innskiftur í einstøkum dystum.

Fyrru hálvu í 1992 beit hann seg rættuliga fastan á liðnumB36-, men eftir at hava lokið studentsprógv sama summarið fór hann til skips, áðrenn hann árið eftir fór til Danmarkar at læra til løgreglumann.

### Ikki vant nóg nógv

Síðani hann kom aftur til Føroya, hevur hann leikt á næstbesta B36 liðnum, tí stundirnar ikki hava verið so góðar til venjing, men orsakað av stóra mannfallinum, sum árstalsfelagnum hevur verið í ár, varð hann togaður upp á besta liðið undan dystinum móti NSÍ.

Talan er sostatt um eitt millumbil upp á knappliga átta ár millum teir báðar seinastu dystirnar. Um talan er um met vita vit ikki at siga, men í øllum førum er talan um rættuliga óvanliga hending.

Har leikti hann so allar 90 minuttirnar, og hóast hann tóktist væl nøgdur við egið avrik, so er ikki sannlíkt, at hann verður ataftuaftur at á besta liðnum í bræði.

Komandi vikuskiftið skal hann nevnliga giftast, og síðani gongur leiðin suðureftir, har brúdleypsferð stendur á skránni.